VIÐMERKINGAR

# Fullveldi er vert at stríðast fyri

**Kristina Háfoss**



Undir heitinum »ríkisfelagsskapurin er verdur at berjast fyri« hevði Jóhan Dahl (JD) grein í bløðunum í vikuni. Spurningurin hann í greinini setur sær fyri at svara, er hesin: »Er tað veruliga so galið við okkara ríkisfelagsskapi sum loysingarmennirnir vilja gera tað til?« – rætti spurningurin er heldur: »Er tað veruliga so gott við okkara ríkisfelagsskapi sum sambandsfólk vilja vera við?« Niðurstøðan er, at so er ikki. Orsøkirnar eru nógvar, og skal í hesi grein verða komið stutt inná nakrar av hesum.

### Løgtingið fær óvirðiliga viðferð

»Vit hava okkara egna lóggevandi vald« – sigur JD í grein síni. Jú rætt er, MEN hetta Løgting verður ikki virt – serstakliga ikki av donsku stjórnini. Ferð eftir ferð eru einmæltar løgtingssamtyktir skúgvaðar til viks. Eitt nú tá eitt einmælt Løgting herfyri samtykti at søkja um fullan føroyskan limaskap í Norðurlandaráðnum, og tá eitt einmælt Løgting herfyri heitti á donsku stjórnina um ikki at seta hernaðarlógir o.a. í gildi fyri Føroyar, uttan at hesar vórðu lagdar fyri Løgtingið fyrst. Nýggjasta dømið er grønlendska heimildarlógin tá umræður uttanríkispolitiskar heimildir. Henda lóg skuldi – uttan at hava verið løgd fyri Løgtingið – til 1. viðgerð á Fólkatingi 21. januar 2005. Í hesi lóg verður m.a. nevnt, at Føroyar og Grønland skulu verða samd í uttanríkispolitiskum málum, har felags áhugamál eru. Hvør sigur at Løgtingið ynskir at Føroyar og Grønland skulu hava felags uttanríkispolitikk? Hetta er enn eitt dømi um, at danir løggeva um Føroyar, meðan Løgtingið verður sett til viks. Hvar er virðingin?

### Landsstýris als ikki javnbjóðis samráðingarpartur

»Vit hava okkara egnu stjórn« – sigur JD í grein síni. So er, MEN talan er um eitt Landsstýri, ið eitt nú als ikki verður viðurkent av donsku stjórnini sum javnbjóðis samráðingarpartur. Hetta kom týðiliga til sjóndar í samband við fullveldissamráðingarnar. Hetta kom somuleiðis til sjóndar í samband við, at løgmaður og fylgi hansara herfyri – eftir at verða komin til Keypmannahavn og hava fyrireikað seg til fundin – fingu fundaravboð bert fáar tímar fyri fundin. Nevnast kann eisini, at so seint sum í ár 1999 boðaði danska stjórnin Sameindu Tjóðum frá, at í Føroyum vóru ongar ætlanir um føroyskt fullveldi. Hetta hóast fyrireikingar til fullveldissamráðingar millum donsku stjórnina og føroyska Landsstýrið tá vóru í hæddini. Hvar er virðingin?

### Føroyskt mál og flagg eru IKKI takka verið ríkisfelagsskapi

»Vit hava okkara egna mál« og »Vit hava okkara egna flagg« – sigur JD í grein síni. Øllum kunnugt er hetta ikki takka verið nøkrum ríkisfelagsskapi ella sambandsfólkum – men hinvegin einans takka verið, at meirlutin av føroyingum hava staðið saman um at verja føroyska málið og flaggið, ið hava so ómetaliga stóran týdning fyri okkara samleika. Sjálvt í dag vilja danir ikki viðurkenna føroyska málið sum tjóðarmál okkara Hvat varð av lovandi orðunum um, at Føroyar, Grønland og Danmark eru tríggir javnbjóðis partar í danska ríkinum? Hvar er virðingin?

### Danska stjórnin: Føroyska tjóðin er ikki til

»Vit kunnu til eina og hvørja tíð og á einum og hvørjum stað kalla okkum føroyingar« – sigur JD í grein síni. Hvat skulu vit brúka hetta til? Vit kunnu eisini kalla okkum suðuroyingar, norðoyingar – sambandsfólk, tjóðveldisfólk – fullveldisland ella eindarstatarland – hvar sum helst. Tað, ið hevur týdning er, um nakar tekur hetta í álvara, og um vit verða viðurkend og vird fyri tað, ið vit siga okkum vera. Og so er ikki. Eitt einælt Løgting er samt um, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti. Hóast hetta, so hevur danska stjórnin ferð eftir ferð boðað frá, at í danska ríkinum er bert ein tjóð – og tað er tann danska tjóðin. Leggjast kann afturat, at so seint sum í 2001 hevur ein donsk sendinevnd boðað Sameindu Tjóðum frá, at føroyingar kenna seg sum danir. Hvar er virðingin?

### Vert at stríðast fyri virðing, viðurkenning og fullveldi

»Sambandsflokkurin er einasti føroyski flokkur, sum veruliga vil ríkisfelagsskap og vil áhaldandi verja og tryggja hesi rættindi« – sigur JD at enda í grein seini. Staðfestast má tí, at Sambandsflokkurin er flokkurin, ið áhaldandi vil tryggja, at føroyingar missa grundleggjandi og avgerandi rættindi.

Heldur átti áhaldandi, og í felag, at verið stríðst fyri at tryggja føroyingum viðurkenning og virðing á javnbjóðis føti við alheims sjálvstøðugar tjóðir – áhaldandi at verið stríðst fyri føroyskum fullveldi.

# Skræpan skal turkast burt!

**Um vikuskiftið, leygardagin 22. januar kl 21.00, í Losjuni í Gøtu, fer SKRÆPA 2005, hitt ultimativa undirgrundstiltakið, av bakkastokki**

TÓNLEIKUR

*tíðindaskriv*

Tá Prix 05 fyrireikararnir herfyri sendu út gleðiboðini um hvør slapp at taka lut í kappingini, vóru mong kring landið sum hugsaðu, talaðu ella róptu hart "YES", "JUHU", "GENIALT" og annað mangt. Og jú, í alt umboð fyri 24 bólkar og einstaklingar høvdu allar grundir til tess. Og lat tað verða vist – tað er hvørjum einstakum teirra sera væl unt!

MEN, samstundis sum gleðisrómurin frá hesum 24 útvaldu fór sum eldur um venjingarhøli, neyst og garasjugrundir, so var samstundis ein lítil skari, eini 8 bólkar og einstaklingar í tali, sum høvdu eittans orð at leggja á tunguna, tá ið lagnusami brævbjálvin varð latin upp, sanniliga "SKRÆPA!" ókst av mongum munni hesa løtuna.

"SKRÆPA – at vit ikki komu við". Nú, vandin við hesum kundi verið, at hesir bólkar og einstaklingar kundu lagt tónliekayrkið frá sær og harvið dottið burtur millum ríka arvin av føroyskum tónleikaútinnarum og harvið verið lutaðir til gloymsku í aldur og allar ævir. Og at einans teimum 24 útvaldu á breiða vegnum til heiður og æru millum manna hevði verið unt hóskiligan sóma. Men, tíbetur, so traðkaði Tónleikasamtakið GRÓT til, og segði, at "So skal ikki verða!". Hesir bólkar mugu eisini sleppa á pall. Hesir tónleikarar, sum eisini hava vant, tikið upp demoir, sent tær inn og hvat veit eg, teir skulu eisini hoyrast. Teir hava uppiborið, um ikki annað so eitt einasta sømiliga tiltak at framføra á. Hesir outside´arar (sum i roynd og verðu eru in í løtuni), hesir berar av sonnu mentanini, skulu eisini sleppa framat fatinum.

Og júst tað hendir nú í vikuskiftinum, leygardagin 22. januar kl 21.00 í Losjuni í Gøtu tá SKRÆPA 2005, hitt ultimativa undirgrundstiltakið, fer av bakkastokki. Tá stíga nú seggir oman Gøtudal hesir reystu tónleikabólkar: Holger og Villmenn, Spylegg, Glitch og Lív Hansen fara nú, sum onkur segði, , at turka skæpuna av sær! Tey fara at sýna fyri øllum Føroya fólki, at hóast tey ikki eru við til Prixkappingina, so eru knotur í teimum og at lortur heftir ikki við.

# Føroyskir gestir á Íslendskum festivali

**Tvinnir bólkar úr GRÓTumhvørvinum spæla á íslendska festivalinum "Allra Veðra Vón", sum verður hildin í Vestmannaoyggjunum leygardagin**

TÓNLEIKUR

*tíðindaskriv*

Tónleikasamtakið GRÓT hevur úr at gera hetta vikuskiftið og alt kann á ein ella annan hátt setast í samband við komandi Prix Føroyar kappingina. Samstundis sum tiltakið "SKRÆPA 2005" verður í Gøtu leygardagin fyri teimum bólkum, ið ikki vunnu sær pláss í prixkappingini hesuferð, so sendir tónleikasamtakið tvinnar bólkar til íslands harav annar er partur av Prixvinnarabólkinum 2003 og hin júst hevur vunnið sær pláss í kappingini fyri 2005. Thrashrokkararnir Sic, sum spældu eina frálíka konsert á G! 2004 og sum júst hava vunnið sær pláss millum luttakararnar til ársins fyrsta prix umfar er nevniliga annar bólkurin. Afturat teimum eru teir báðir Ólavur og Torfinnur Jákupson, kendir sum ávikavist forsangari og forguitaristur í Gestir, eisini bodnir við til Íslands.

Ólavur og Torfinnur spæla leygarkvøldið kl 19.55 og Sic trína pallin leygarkvøldið kl 22.05.

Vitjanin til Vestmannaoyggjarnar er komið í lag við at tveir bólkar har frá vóru og vitjaðu á G! Festival 2004, Hoffmann og Hafdís, og við teimum ein av fyriskiparunum av tiltakinum Allra Veðra Vón, Óðinn Hilminsson. Hesin hevur so bjóða tveimum bólkum við tilknýti til GRÓTumhvørvið yvir til Íslands at framføra. Gøta og Vestmannaoyggjar eru vinarbýir og kommunurnar báðar stuðla uppundir samband og samskifti millum støðini bæði. Sostatt er stuðul fingin frá Gøtu Kommunu og GRÓT til at senda bólkarnar yvir. Saman við tónleikarunum fer eisini Jón Tyril sum umboð fyri GRÓT og G! Festival.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.